# HEILSANIR



Øllum tykkum, sum gleddu meg og foreldur míni á mínum konfirmatiónsdegi 28. mars 2004 takki eg hjartaliga. Bæði fyri gávur, kort, vitjanir og heilsanir annars. Uttan tykkum bleiv dagurin ikki so hugnaligur sum hann annars var. Eisini vil eg ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár. Takk fyri.
**Heilsan Ári Jógvansson Olsen**



Vit takka hjartaliga øllum tykkum, sum mintust til mín á konfirmatiónsdegnum 10. okt. Eisini ynskja vit øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.
**Heilsan Hergar við familju**



Foreldur míni og eg takka hjartaliga tykkum, sum mintust meg á fermingardegnum t. 3. okt. 2004, við heilsanum, gávum og við at vitja inn á gólvið. Eina serliga tøkk til tykkum, hvørs hjálp varð sjálvur karmurin um ein minnisríkan og lívgandi dag. Gleðilig jól og eitt signað nýggjár ynskja vit tykkum øllum.
**Blíðar heilsanir**
**Elin Dam Egholm**



**Góði Elias**
Hjartaliga tillukku á 5 ára degnum 20. des. Her er tí »cool«
**Heilsan vit í Rossagøtu 2**



**Góði Árni**
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum! Ja, vit eru tveir raskir arbeiðssamir knassar, og vit eru sterkir og lyfta nógvar kassar. Í Zoologisk museum vit skutu ein mammutt í vár, hann var so vakur, og fekk tíbetur einki sár. Vóni tú skjótt aftur kemur til Keypmannahavnar, so fara vit í djóragarðin at vita, um vit siggja nakrar ravnar. Muss og klemm
**Ynskir Markus Helgi**



**Góði babba**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Eg elski teg.
**Kristina**



**Hey Svend**
Hjartaliga tillukku við piparinum.
**Kærar heilsanir svigermor**



Her er tú ungur, nú er tú pip...
**Hon sjálv**



**Til leiðaran á Dagstovninum í Hoyvík**
Hjartaliga tillukku ið degnum.
**Heilsan myndatakarin**



**Góði Karl Emil**
Hjartaliga tillukku við degnum, sum var tann 14. Alt gott í framtííni.
**Ynskja vit, omma og abbi í Runavík**



**Góði fitti Sverri**
Hjartaliga tillukku við 10 ára føðingardegnum, sum er í dag. Pannukøkurnar smakkaðu væl hjá tær. Jesus pápi signi lívsleiðtína. Tey allarbestu ynskir frá okkum her norðuri
**Abbi og omma**



Øllum tykkum sum á ymiskan hátt gleddu okkum á diamantbrúðleypsdegnum 10. des. takka vit hjartaliga. Takk fyri uppringingar, fjarrit, blómur og tit sum stukku inn á gólvið. Somuleiðis ynskja vit øllum eini gleðilig jól og gott nýggjár.
**Heilsan Inger og Hjørleif**



**Góði babba**
Hjartaliga tillukku við 50 ára degnum í dag. Her sært tú ungur og raskur út, men nú ert tú bara raskur. Vónandi fáa vit ein góðan føðingardag, við ynski um Guds ríku signing í framtíðini
**Heilsan døturnar**


30,- kr.

## Heilsanir

Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....................................................................
.................................................................................
.................................................................................
.................................................................................
.................................................................................
.................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: .........................................................................
Bústaður: ...................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:

Sosialurin

Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**